# HØGRA VEIT IK VINSTRA GER

**LØGIÐ MÁL** Nú løgreglan í síðstu viku var umborð á fiskiskipinum Athenu, sum herfyri umskipaði veiðina í Kollafirði og kanska soleiðis hevur brotið nýggjar kunngerðir, sum eru knýttar at útlendingalógini, er greitt, at tað er Fiskimálaráðið, sum hevur kravt, at skipini hjá Thor umskipa veiðina í føroyskari havn – og ikki á opnum havi. Líkt er til, at hetta krav er komið dátt við hjá landsstýriskvinnuni í útlendingamálum




*Báðir trolararnir hjá Thor í Hósvík, Athena (mynd) og Poseidon, hava seinastu dagarnir ligið uttaná frystifarmaskipi við nýggja havnalagið á Oyrareingjum. Løgreglan, sum hevur eftirlitsmyndugleikan á útlendingaøkinum, hevur verið umborð og kanna eftir, hvat fyriferst*
Mynd: Vilmund Jacobsen

Vilmund Jacobsen

Í síðstu viku var løgreglan umborð á fiskiskipinum Athenu, sum lá uttaná einum frystiskipi við nýggju atløgubryggjuna á Oyrareingjum og umskipaði veiðina. Á síni eftirlitsvitjan staðfesti løgreglan, at tað var manningin umborð á Athenu, sum gjørdi arbeiðið, og nú er løgreglan so farin at kanna, um grundarlag er fyri at reisa ákæru móti skipi og reiðarí fyri brot á nýggjar kunngerðir í útlendingalógini.

Sum skilst, eru nýggjar kunngerðir lýstar á økinum í summar – kunngerðir, sum føroyskir myndugleikar eftir øllum at døma ikki rættiliga hava givið sær far um.

## Ein keðilig vend

Í samrøðu við Sosialin fríggjadagin, helt Annika Olsen, landsstýriskvinna í lógarmálum, tað vera óheppið og keðiligt, at Athena kom til bryggju at skipa veiðina umborð á frystifarmaskipið.

Annika Olsen hevur nevniliga fingið svar frá danska Integratiónsministeriinum, at skip við útlendskari manning, sum ikki hevur arbeiðsloyvi í Føroyum, kann arbeiða og eitt nú umskipa veiði innanfyri 12 fjóðingar, um hetta bara verður gjørt nakrar fáar ferðir – í einum stuttum tíðarskeiði.

Í samrøðuni í Sosialinum helt landsstýriskvinnan, at málið nú tykist øðrvísi, tá Athena hevur ligið við bryggju á Oyareingjum og hevur umskipað veiðina.

– Eg visti einki um, at hetta var ætlanin hjá reiðarínum, men at ætlanin var at umskipa á opnum havi, og tí havi eg heldur ikki spurt Integratiónsministeriið um hetta. Nú er hetta eitt mál, sum ikki liggur í okkara hondum, men eitt mál, sum løgreglan, sum er eftirlitsmyndugleiki í útlendingamálum, tekur sær av, sigur hon.

Síðan fyrst Athena umskipaði veiðina á Oyrareingjum í síðstu viku, hevur eisini hin trolarin hjá Thor, Poseidon, ligið uttaná frystifarmaskipinum á Oyrareingjum seinastu dagarnar.

## Havnin er krav

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur við Sosialin, at tað er eitt krav frá Fiskimálaráðnum, at umskiping og eitt nú bunkring fer fram í havn – og ikki úti á reduni. Hetta er galdandi fyri útlendsk skip, sum eru í okkara sjógvi, og má tí eisini vera galdandi